**Miðlastuðulsnevndin**

Mentamálaráðið
Tinghúsvegur 7
Postrúm 3279
FO-110 Tórshavn

8. mars 2021

**Mentamálaráðið**
**Tinghúsvegur 7**
**Postrúm 3279**
**FO-110 Tórshavn**

**Frágreiðing um viðgerð av umsóknunum frá 2020**

Sambært § 7, stk. í løgtingslóg um miðlastuðul gevur Miðlastuðulsnevndin við árslok á hvørjum ári landsstýrismanninum eina skrivliga frágreiðing um sítt virksemi. Landsstýrismaðurin leggur frágreiðingina alment fram á netið.

Frágreiðingin fyri umsóknirnar frá 2020 er av ymiskum orsøkum nakað seinkað, hóast størsti parturin av hesi frágreiðing varð lagdur alment fram í tíðindaskrivi frá 22. desember 2020, tá umsøkjarnir eisini vórðu kunnaðir um avgerðirnar í mun til teirra umsóknir.

Tíðindaskrivið var soljóðandi og varð sent føroyskum miðlum:

*Miðlastuðulsnevndin er liðug at viðgera umsóknirnar um miðlastuðul fyri 2020. Niðurstøðan er, at sjey føroyskir miðlar fáa part av samlaðu miðlastuðulsjáttanini á tvær milliónir krónur.*

*Átta umsóknir vóru til miðlastuðul í ár, sum er sama tal sum í fjør. Teir sjey miðlarnir, ið lúka treytirnar fyri stuðli, fáa úr 175.373,06 kr. upp í 678.103,33 kr. í stuðli í ár.*

*Tvær milliónir eru settar av á fíggjarlógini fyri 2020 til miðlastuðul, og býtið millum miðlarnar er sum víst niðanfyri við støði í fíggjarligum upplýsingum frá 2019:*

| | |
|---|---|
| *Sosialurin* | *kr. 678.103,33* |
| *Dimmalætting* | *kr. 276.958,60* |
| *Portal.fo* | *kr. 237.741,44* |
| *Norðlýsið* | *kr. 231.843,82* |
| *FM1* | *kr. 207.911,02* |
| *R7 Kringvarp* | *kr. 192.068,72* |
| *VP.fo* | *kr. 175.373,06* |

*Miðlastuðul verður játtaður við heimild í miðlastuðulslógini. Stuðulin verður latin sum ein føst grundupphædd, áljóðandi 40% av árligu játtanini á fíggjarlógini, býtt javnt millum umsøkjararnar, sum lúka treytirnar, og harumframt verða 60% av árligu játtanini latin sum ein lutfalslig upphædd í prosentum av skjalprógvaðum lønarútreiðslum árið fyri umsóknarárið hjá viðkomandi miðli.*

*Samlaði miðlastuðulin kann í mesta lagi vera 40% av skjalprógvaðu lønarútreiðslunum árið fyri umsóknarárið hjá einum miðli. Í mun til í fjør eru lønirnar hjá teimum sjey miðlunum, sum hava fingið stuðul játtaðan, øktar úr umleið 21,0 til 21,5 mió. kr.*

**Miðlastuðulsnevndin**

Mentamálaráðið
Tinghúsvegur 7
Postrúm 3279
FO-110 Tórshavn

*Miðlastuðulsnevndin hevur í viðgerðini av teimum átta umsóknunum í stóran mun fylgt leistinum frá seinastu trimum árunum við einari lutfalsliga breiðari tulking í mun til treytirnar, ið lógin og viðmerkingarnar til lógina seta til innihaldið í miðlunum.*

*Miðlastuðulsnevndin hevur í hesum sambandi viðgjørt ávísar prinsipiellar spurningar, herundir millum annað, at lóggávan í løtuni er sett soleiðis saman, at tað fyrst og fremst eru lønarútreiðslur í árinum fyri, ið hava størstan týdning, og ikki onnur viðurskift, til dømis framleiðsla ella framtíðarætlanir.*

*Tá miðlastuðulin var latin í fjør staðfesti miðlastuðulsnevndin, at ætlanin hjá samgonguni er at eftirmeta skipanina við miðlastuðli og at hetta eisini samsvarar við, at mentanarnevndin hjá løgtinginum í sínum áliti um miðlastuðulsnevndini í 2017 mælti til, at lógin eigur at verða endurskoðað fýra ára eftir, at hon varð sett í gildi.*

*Miðlastuðulsnevndin upplýsti tá, at hon tók undir við hesi ætlan, og heldur tað vera skilagott at eftirmeta, um stuðulin er við til at røkka teimum endamálum um margfeldi í miðlalandslagnum og journalistiska dygd, sum politiska skipanin upprunaliga hevði við miðlastuðlinum.*

*Hetta er framhaldandi støðan hjá Miðlastuðulsnevndini. Nevndin kann í hesum sambandi skoyta uppí, at verandi skipan við sera stórum denti á undanfarin fíggjarár og lønarútreiðslur, havandi í huga fráboðanir frá miðlum seinastu vikurnar og mánaðirnar, ikki sær út til at tryggja verandi margfeldi í miðlalandslagnum. Sera torført er at meta um, hvussu játtaðu upphæddirnar ávirka framleitt journalistiskt tilfar á jaligan hátt. Samstundis merkir tað eisini, at metingar um journalistiska dygd og skapanarhug hava sera lítið rúm í verandi regluverki.*

Í samband við hesa viðgerð kann nevndin leggja afturat, at umsóknirnar tilsamans vórðu viðgjørdar á 4 fundum í tíðarskeiðnum 19-11-2020 til og við 21-11-2020.

Eftir at stuðulin varð latin, heitti ein miðil á nevndina um at taka teirra umsókn upp til nýggja viðgerð. Í samband við hesa áheitan vendi nevndin sær til UMMR viðvíkjandi møguleikanum fyri nýtslu av sakkønari hjálp. Nevndin fekk heimild at seta seg í samband við uttanhýsis løgfrøðiliga ráðgeving, sum ráðgav nevndini at lata vera við at taka málið upp til nýggja viðgerð. Í samband við hesa áheitan um nýggja viðgerð hevði nevndin tveir fundir.

| Eirikur í Jákupsstovu | Rógvi Olavson | Beate Lindenskov Samuelsen |
|---|---|---|
| formaður | nevndarlimur | nevndarlimur |